FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Føroya søga

## Visit Faroe Islands 2023

# Innihald



- Úr politisku søguni
- - Meginting og heimating
- - Úr søgn og søgu
- - Skansin í Havn
- - Løgtingið
- - Læknastríðið

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Heimsins elsta ting?

- Griksku tingini – 500 f.Kr.
- Norsku tingini – 400 e.Kr.
  - Gulating – á Vesturlandinum
  - Eiðsvatnting – á Eysturlandnum
  - Borgarting – á Víkini
  - Frostating – í Tróndarløgum
- Íslendska altingið – 930 e.Kr.
- Tynvald Isle of Man – 976 (914) e.Kr.
- Føroyska altingið – 970? e.Kr.

# Forn heimatingstøð – 900-1500?

- Norðoyggjum – á Køtlum omanfyri Árnafjørð
- Eysturoy - Tingfløtan omanfyri Gøtuvík
- Eysturoy - Stevnuválur millum Fjarða
- Streymoy - á Kjalnesi
- Vágum - á Giljanesi ella á Ryggi
- Sandoy - í Trøðum
- Suðuroy - Uppi millum Stovur, við Øravík

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Á Køtlum



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Tingskipan

- Løgtingið:
- - yvirrættur í Tórshavn
- - 36 løgrættumenn (6x6)
- - 48 løgrættumenn frá 1688 (6x8)
- - løgmaður dømdi
- - fútin ákæri

- Heimating:
- - undirrættur í sýslunum
- - 6 løgrættumenn
- - 8 løgrættumenn frá 1688
- - løgmaður, seinni sorinskrivarin, dømdi
- - sýslumaðurin ákæri

# Sambært Sámali Petersen




FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Klaksvík umleið 1898



# Nýggjari heimatingstøð 1500?-1896

- Í Norðuroyggjum var tingstaðurin tá heimi í Vági í Klaksvík
- Í Eysturoy á Selatrað
- Á Streymoy við Sjógv í Kollafirði
- Í Vágum á Ryggi í Miðvági
- Á Sandoy í Trøðum
- Í Suðuroy í Øravík. Tingstaðurin í Øravík varð fluttur til Hvalbiar í 1812, men í 1872 varð hann fluttur aftur til Øravíkar.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Í Vági

Søgnin sigur, at fyrsta búsetingin í Vági var við Ósánna, men bóndahúsini í Vági hava alt tað, fólk vita um, staðið beint norðan fyri Gamla Kirkjugarð. Í 1960-árunum vórðu húsini tikin niður.

Á hesum søguliga stað hevur ting norðoyinga í øllum førum verið sett síðani 1600-talið, og kirkjugongdin í Bø varð hildin í kirkjuni við Gamla Kirkjugarð til 1867, tá ið nýggj kirkja varð bygd og vígd á øðrum stað, yviri á Gerðareiði.





FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA




FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Páll Jóhannesen (Fangi)



Dømdur á Norðoya vártingi í 1653 at missa alla ogn sína, tí hann hevði átt barn saman við trímenninginum Siggu Torbergsdóttir, og at fara av landinum – hann fór tó ikki av landinum.

Sigga skuldsetur í 1656 Páll fyri at hava dripið pápa sín.

Í september 1657 varð Páll á løgtingi fyri gand, trýfalda flýggjan og stuldur dømdur at fara niður á Bremarhólm at arbeiða, meðan Sigga samstundis varð dømd fyri at hava átt barn við øðrum manni.

Helst fór Páll niður á Bremarhólm at sita dómin, men tingbókin sigur einki um tað. Tað er hinvegin áhugavert, at 27. juli 1670 møtir ein eiðismaður á løgtingi, stevndur fyri barn, sum hann skal hava havt saman við »eini kvinnu við navninum Marin Jóansdóttir, sum hevur havt ein mann við navninum Páll Jóhannesson úr Mikladali, sum fyri á leið átta árum síðan er farin av landinum og rýmdur frá áðurnevndu kvinnu«.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Kalsoyggin



Søgnin vil vera við, at fyrstu ferð, Páll varð tikin aftur og førdur til Havnar, beyð hann sær at lesa seg við línu upp fyri fjallið Borgaran (á norðurendanum á Kalsoynni), sum var 300 favnar høgt, fyri at sleppa við lívinum. Tað varð sýtt honum at royna at fremja hetta bragdið, tí hildið varð, at hann fór at verða maður fyri at útinna tað. Hendan søgan er einans at finna í søgnini. Í tingbókini er einki nevnt um, at Páll setti fram hetta tilboðið. Tað er hinvegin nevnt í tingbókini, at Páll flýddi tríggjar ferðir úr varðhaldinum, sum søgnin eisini vil vera við.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Páll Fangi og Hanus í Gerðum



Sambært søgnini var tað undir Barmi uttanfyri Árnfjarðarvík, at Páll Fangi varð tikin av Hanusi í Gerðum. Hendingin er einans nevnd í søgnini; hon er ikki nevnd í tingskjølunum. Søguligur kjarni kann kortini vera aftanfyri, men helst er søgan broytt. Sambært søgnini kom Páll aftur til Bø við loyniskipi einaferð aftaná 1683.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Vártingsbókin 4. marts 1657

Niels Antinisson varð á Norðoya vártingi 4. mars 1657 dømdur at verða hongdur í gálga fyri fleirfaldan stuldur í Bø. Sambært stuldursbólkinum í Landslógini skuldi maður verða avrættaður, um hann stjól fyri fjórðu ferð. Tingbókin upplýsir einki um, hvaðani Niels Antinisson var. Tað kundi bent á, at hann var úr Bø ella Norðuroyggjum. Tá ið fólk úr øðrum oyggjum møttu á vártingi, varð ofta tilskilað, hvaðani tey vóru. Antinisnavnið er væl kent á Uppsølum, men tað sæst eisini at hava verið nýtt eitt nú í Gøtu.



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Niels Antinisson 4. marts 1657

Niels Antinisson var 3 ferðir áður kákstrokin fyri líknandi brotsverk.

Hann hevði m.a. játtað seg sekan í at hava stolið 6 krov, seyðaskinn og tálg frá tí seinni so kenda Hanusi í Gerðum, sum árið fyri 30 ára gamal hevði fest allar tær góðu 24 merkurnar av kongsjørð í Gerðum.

Hann játtaði seg eisini sekan í at hava stolið eitt krov frá Hanusi árið fyri.

Harumframt játtaði hann seg sekan í at hava stolið eitt krov frá Andrasi Arantssyni, løgrættumanni og kongsbónda í *Innistovu* í Vági. Hetta var hansara fjórði stuldur.

Í dóminum verður sagt, at av tí, at Niels Antinisson hevði stolið fyri fjórðu ferð:

> *»so kunnu vit ikki seta hann frían sambært lógini, men døma hann frá lívinum til gálgan, eftir stuldursbólkinum fyrsta kapittul, uttan so, at Fútin hjá Hansara Hátign náðar hann«*.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Deyðadómar

Tað vóru 20 deyðadómar feldir í 1615-1734 – 14 vórðu útintir

Seinasti útinti deyðadómurin var í 1706

Seinasti feldi deyðadómurin í Føroyum var í 1846



## Nólsoyar-Páll (1766-1808)







## Friðurin í Kiel 1814

# Havnar skansi

Føroyar undir Napoleonskríggjunum (1803-1815)

A) Stórpolitisku hendingarnar, sum høvdu við sær, at Føroyar fóru frá at vera norskar til at vera danskar og hvønn týdning tað hevði fyri Føroyar

B) Hertøkan av Skansanum

C) Friðurin í Kiel 1814





FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Bumba við Løgtingið 18. september 1945



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Læknastríðið



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Læknastríðið



# Læknastríðið



# Takk fyri